Samkoma var á Hálsi fríggjadagin, tá Farpack fekk ISO góðkenning, so at fyritøkan nú hevur eina altjóða góðskugóðkenning

Mynd: Jens Kr. Vang

Farpack fingið góðkenning

Fyritøkan Farpack, ið mest framleiðir pakning til fiskivinnuna, hevur fingið ISO 9001:2000 góðkenningina. Góðkenningin skal vera við til at menna fyritøkuna, sigur Líggjas Joensen, stjóri

GÓÐKENNING
Stefan í Skorini

Fríggjadagin 9. mars var samkoma í hølunum hjá Farpack á Hálsi í Havn. Hetta var í sambandi við, at fyritøkan hevur fingið ISO góðkenningina.

Góðkenningin ber í sær, at Farpack hevur fingið staðfest, at fyritøkan lýkur nøkur altjóða krøv. Krøv verða sett til innkeyp, marknaðarføring, søla og flutningur av pakningi og øðrum til fiskivinnuna og annan ídna.

– Vit hava brúkt eitt ár ella meira enn tað til at fyrireika okkum til hesa góðkenningina. Tað ber í sær, at vit hava lýst nakrar mannagongdir í fyritøkuni. T.d. verður lýst, hvat hendir, tá ein kundi bíleggur vøru frá okkum, sigur Líggjas Joensen.

Hesar mannagongdir eru nú góðkendar og lúka altjóða krøv, sambært hesi nýggju góðkenningini.

– Henda góðkenningin skal fyrst og fremst nýtast til at hava eina so góða service fyri kundan sum gjørligt. Henda góðkenningin er góð fyri okkum á tann hátt, at vit mennast sum fyritøka, sigur Líggjas Joensen, ið leggur afturat, at góðkenningin kann nýtast sum eitt atgongumerki inn í oljuvinnuna, um tað kemur uppá tal.

Líggjas sigur, at Farpack saman við Thor Shipping, er fyrsta fyritøkan, sum fær hesa góðkenning ígjøgnum Det Norske Veritas.

Við Sosialinum
Í BÝIN
Komandi hósdag
vitja vit
HOTEL VÁGAR
Og tú sleppur at fylgja við hvussu hetta spælir av
Les í býin næsta hósdag !

Stórar umvælingar strandaðar

Lítið er gjørt við skaðarnar í Klaksvík eftir gloprareglnið í fjør, og Klaksvíkar kommuna hevur einki svar fingið frá landsstýrinum um fíggjarliga hjálp til umvælingarnar

SKAÐAR
Eyðun Klakstein

Klaksvík: Nógvir av skaðunum, sum hendu í ógvusliga gloprareglnum í Klaksvík í fjør, eru framvegis ikki gjørdir aftur.

Mest árokandi umvælingarnar eru gjørdar, og Klaksvíkar kommuna hevur brúkt meiri enn eina millión krónur til hetta. Framvegis eru umvælingar fyri einar fýra milliónir krónur eftir at gera, men tað er trupult at finna pengar til hetta arbeiðið.

– Vit hava avmarkaðan íløgukarm og avmarkaða fíggjarorku. Tí skapa fimm milliónir í eini óvæntaðari eykarokning sum hesari trupulleikar hjá okkum, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík

Liggur enn

Tað var 18. september í fjør, at tað regnaði so illa í Klaksvík, at tað fleyt yvir í øllum býnum.

Vegir, gongubreytir, rørleiðingar og hús fingu skaða í óhoyrda gloprareglnum, og nógvir av hesum skaðum liggja framvegis óumvældir.

Jógvan við Keldu, sum var borgarstjóri í Klaksvík í fjør, helt, at tað var umráðandi at umvæla skaðarnar beinanvegin, og tað var eisini við hesum í huga, at Klaksvíkar býráð samtykti at senda eina umsøkn um fíggjarliga hjálp til landsstýrið.

Í sambandi við hesa umsøkn var ein kostnaðarmeting gjørd av skaðunum, og tekniska umsitinin hjá kommununi kom til, at skaðarnir fóru at kosta um fimm milliónir at umvæla.

Einki svar

Hóast tað nú eru gingið eitt hálvt ár, síðani Klaksvíkar kommuna sendi landsstýrinum umsøknina, er einki svar komið til Klaksvíkar.

– Tað kennist skuffandi ikki at fáa so mikið sum eitt svar frá landsstýrinum, sigur Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík.

– Tað er framvegis nógv arbeiði eftir at gera, og tað hevði komið væl við, um vit fingu stuðul frá landsstýrinum til hetta arbeiðið.

Stórir skaðar hendu á Helnabrekku, har partur av vegnum og gongubreyt skolaðu burtur, Fjósabrekkan er í sera ringum standi, frítíðarøkið úti í Grøv fekk somuleiðis ein rættiliga snudd, og nógvar rørleiðingar í býnum hava fingið skaða.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá løgmanni fyrrapartin í gjár.

Fjósbrekkan fekk stóran skaða í nógva regninum í Klaksvík í fjør. Vegurin er illa farin og rørleiðingar hava fingið skaða. Einki er enn gjørt við hesa skaðar

Mynd: Eyðun Klakstein

Í býin Í býin Í býin
- altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin
Fríggja.- og leygarkvøldið spæla
DRIV
ALLIR FÓTBÓLTSDYSTIR Á STÓRSKÝGGJA Í KAGGANUM
Kaggin Kaggin Kaggin
www.kaggin.fo

NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

Á matarseðlinum
BAKAÐ EPLI 45,-
v/ tunsalat, tza tzi ki ella avocado dip
TOAST 35,-
v/ salat
SÚPAN 35,-
v/ breyði
SNACKS
Nachos: Cheese ella Mexican
v/avocado dip ella tza tzi ki 20,-
Livandi tónleikur
FRÁ 8. TIL 18. MARS
syngur og spælir enski vísusangarin og undirhaldarin Doc á caféini.
livandi tónleikur
CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25

HESA VIKUNA
Kári Annand Hóskvøldið
14,95 pr. eind frá 21.00 til 22.00
Martin Kjærbo Fríggjakvøldið
ladies night
14,95 pr. eind frá 22.00 til 00.30
Rúni & Høgni Leygarkvøldið
14,95 pr. eind frá 22.00 til 00.30
Ottar í Funnings. Sunnukvøldið
»KARAOKE«
Café'in hevur opið mán.-frí. 17.00-24.00 og leyg.-sun. 14.00-24.00
Club 20 Café
TANN BESTI Í LANDINUM
Piparbúffur bert
v/salat, chips & piparsós
69,-
FÓTBÓLTUR Á STÓRSKÝGGJA
Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28

fk Matseðilin
Hósdagin 15. mars:
Kálvafrikassé
Fríggjadagin 16. mars:
Beefsteak
Leygardagin 17. mars:
Nakkaflak
Mánadagin 9. mars:
Kjøtbollar í karry
Týsdagin 20. mars:
Livur
Mikudagin 21. mars:
Milliónbúffur
Kostnaður 32,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari ella
Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

Indisk menu
Fríggjakvøldið 16. og leygarkvøldið 17. mars.
Borðbílegging á tlf. 31 75 00
Kostnaður kr. 175,-
Hotel Føroyar

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
www.marcopolo.fo
Hugnakvøld í Cleopatra
við
Eivør Pállsdóttir

Eysturoy

JOHN'S RESTURANT
TILBOÐ
Fríggjadag og leygadag
Skeljadjórssúpan v/ safran
70,-
Kokosnøt marineraður Steinbýti v/ grønmeti og hvítum eplum
165,-
Búff a'la Califonia v/ bakaðum eplum
145,-
Opið sunnudag til hósdag frá kl. 11.00 til 22.00
Fríggjadag og leygardag til kl 23.00
Vit borðreiða við døgurða frá kl. 12.00 - 16.00 hvønn dag.
JOHN'S RESTURANT
SALTANGARÁ
tel. 44 86 90

Norðoyggjar

Sjavskapping og vísukvøld v/ Helga Midjord verður fríggjakvøldið
Diskoteque verður leygarkvøldið.
Fróði skipar fyri
Klaksvíkar Klubbi